# Gula smæra

Merkið skal takast saman við patruljuni, liðnum ella á legu saman við øðrum skótum.

## Legulív

Patruljan skal í felag arbeiða við hesum uppgávunum:

- [ ] Gera einfaldan mat á báli
- [ ] Sova í Tjaldi
- [ ] Pionering. Duga timburbregd, stavnabregd, krosssurring og vinkulsurring.
- [ ] Duga at brúka stormkøk og gera eina máltíð.
- [ ] Skipa fyri einum spæli ella einum rørslusangi við eitt legubál

Patruljan velur í felag tríggjar uppgávur at arbeiða við.

- [ ] Gera eitt spæl sum tit spæla á eini legu
- [ ] Duga at reisa tjald á rættan hátt. Tit kunnu venja tykkum á ymiskan hátt. Eitt nú við bind fyri eyguni, í regni ella kappast við aðra patrulju hvør er skjótast.
- [ ] Gera ein vev, sum allar royna at veva á.
- [ ] Gera eina forðarenning. Og royna hana sjálvar.
- [ ] Hita vatn við sólorku
- [ ] Seyma ein legukodda
- [ ] Kenna minst trý bálsløg og vel eitt av teimum at gera.

## SAMSKIPAN OG ALTJÓÐA SAMSTARV

Patruljan skal í felga arbeiða við hesum:

- [ ] Finna felags eyðkenni fyri gentuskótar kring allan heimin
- [ ] Vita hvat Hugsanardagur er og luttaka á einum hugsanardagstiltaki.
- [ ] Gera eitt felags tiltak saman við einari aðrari patrulju ella liði
- [ ] Læra um WAGGGS og teirra virksemi.
- [ ] Vita hvønn týdning ymisku merkini á búnanum hava. Kenna munin á Føroysku og altjóða smæruni og hvønn symbolik smærurnar hava.
- [ ] Kenna endamálið og meiningina við patruljuskipanini

Patruljan velur í felag tríggjar uppgávur at arbeiða við.

- ▢ Kenna søguna hjá Føroya KFUK-skótum.
- ▢ Bjóða "gomlum" skótum at koma á skótafund og greiða frá.
- ▢ Bið um loyvi frá leiðarunum at lesa í gomlum patruljudagbókum og haldið ein patrulju ella liðfund eins og tann í dagbókini.
- ▢ Gera legumat frá einum av hinum norðurlondunum
- ▢ Læra ein útlendskan skótasang
- ▢ Fyrireika og standa fyri einum tiltaki í samband við Hugsanardagin
- ▢ Gera ein leik ella tekna eina tíðarlinju um altóða skótasøguna.
- ▢ Kenna til skótacentrini hjá WAGGGS. Setið tykkum inn í teirra virksemi og hvar tey liggja
- ▢ Arbeiðið við tilfari frá WAGGGS. Tit kunnu eitt nú taka hugsanardagsmerkið, free being me, stop the violence ella annað https://www.wagggs.org/en

# SAMFELAGIÐ OG SKÓTAVIRKSEMI

Patruljan skal í felag arbeiða við hesum

- ▢ Læra at finna høvuðsættirnar úti í náttúruni uttan at brúka kumpas.
- ▢ Læra at brúka kort og kumpas.
- ▢ Duga hesir knútar: Rættan knút, flaggknút, áttatalsknút, stavnabregd og timburbregd. Vita hvat teir kunnu nýtast til.
- ▢ Duga at brúka knív og øks. Duga trygdarfyrilitini.
- ▢ Duga at reinsa sár, viðgera skurðsl, leggja plástur á. Taka flís úr og leggja turriklæðumbinding.
- ▢ Duga at nýta morsilykil og senda boð til hvørja aðra við morsifløggum og lummalykt.

Patruljan velur í felag tríggjar uppgávur at arbeiða við.

- ▢ Vita hvussu og nær Merkið verður vundið á stong og tikið niður. Duga "Tú alfagra land mítt" og "Sjá tú blánar".
- ▢ Gera ein loyniskrift til patruljuna
- ▢ Lærið tykkum tey mest brúktu deyvateknunum og syng ein sang har tit venja hesi tekn.
- ▢ Gera ein Patruljumaskot.
- ▢ Gera eina kapping fyri einum yngri skótaliði, har tit læra tær fyrstuhjálp.
- ▢ Spæla eitt spæl har tit læra tykkum ættirnar.
- ▢ Velja tykkum minst 5 støð í bygdini/býnum. Kortleggið eina rutu til hesi støð og fylgja rutuni.

- ☐ Bjóða ommum og abbum ella øðrum eldri fólki við á patruljufund og fá tey at fortelja frá barnaárunum.
- ☐ Læra at skriva patruljunavnið og tykkara egna navn við blindskrift ( Braille)

## KRISTNIKUNNLEIKI OG HJÁLPARARBEIÐI

Patruljan skal í felag arbeiða við hesum.

- ☐ Vita hví vit hava skótahjálpina. Luttaka í peningainnsavningini til skótahjálpina.
- ☐ Vita nær Kristindómurin kom til Føroyar og hvør boðaði hann.
- ☐ Kanna hvørjir hjálparfelagskapir eru í Føroyum. Vitjið ein teirra, ella fái ein at koma at greiða frá teirra virksemi.
- ☐ Yrkja eitt borðvers og syngja tað á eini legu
- ☐ Kanna í bíbliuni hvør matur varð etin tá, og ger eina máltíð einans við matvørðum, ið verða nevndar í bíbliuni.

Patruljan velur í felag tríggjar uppgávur at arbeiða við.

- ☐ Les í sálmabókini um dópin og vita hví børn vera heimadoypt.
- ☐ Lærið tykkum eitt borðvers á einum øðrum máli.
- ☐ Gerið nakað serligt burturúr sum patrulja, fyri at savna mest møguligt inn til Skótahjálpina.
- ☐ Syngja ein sálm, ið verður nýttur til serlig høvi í kirkjuni, eitt nú dóps-, jarðarferð ella jólasálm og tosið um innihaldið.
- ☐ Gera ein leik ella ein dukkusjónleik um eina hending úr bíbliuni og framfør fyri hinum í liðnum.
- ☐ Kanna kirkjurúmið og fáa greiði á hvønn týdning teir ymisku lutirnir í kirkjuni hava. Vita í hvørja ætt flest kirkjur venda og hví.
- ☐ Vera í kirkju tá í barnadópur er. Vita hvussu dópur og ferming fer framm.

## NÁTTÚRA OG UMHVØRVI

Patruljan skal í felag arbeiða við hesum.

- ☐ Duga á at skyna hvørji evni ganga til grundar í náttúruni og hvørji ikki gera.
- ☐ Duga at skilja burturkast og vita hvat kann endurnýtast, hvat kann tyrvast, hvat brennur o.s.fr.
- ☐ Fara ein túr út í hagan og finna minst 5 ymiskar plantur. Kanna hvussu

tær eita. Tak mynd av plantunum heldur enn at heinta tær, so troyta tit ikki náttúruna óneyðugt.

- [ ] Fara ein túr út í hagan at síggja og hoyra 5 ymiskar fuglar. Kanna hvussu teir eita og hvar teir halda til.
- [ ] Luttak í einum tiltaki ella skipið sjálvar fyri einum tiltaki, ið hevur til endamáls at ruddað eitt náttúruøki, ið er dálkað við burturkasti.
- [ ] Gangið ein túr í náttúruni. Minst 5km.

<u>Patruljan velur í felag tríggjar uppgávur at arbeiða við.</u>

- [ ] Fara á seiðaberg. Kryvja fiskin og gera eina máltíð burturúr fonginum.
- [ ] Planta eitt træ
- [ ] Kanna eitt lendi í náttúruni. Gerið eitt yvirlit yvir hvat tit finna har. Hvat slag av plantum, djórum, vøkstri, steinum o.s.fr. Gerið eisini eina meting av í hvønn mun lendið er dálkað og hvat slag av dálking talan er um.
- [ ] Finna lutir úti í náttúruni og gera eina prýðismynd av teimum.
- [ ] Vera við í eini venjing, har tit læra tykkum at sníkja tykkum fram ljóðleyst og ósædd
- [ ] Lær meira um tykkara patruljufugl:
    - Tekna eina mynd av tykkara patruljufugli
    - Lærið latínska navnið
    - Hvat slag av fugli er talan um? Rovfuglur, heiðafuglur, smáfuglur, sjófuglur
    - Er hann flytifuglur? Nær kemur hann til Føroya?
    - Hvussu nógv egg verpur hann og  hvussu vorðin eru tey?
    - Hvussu letur fuglurin
- [ ] Kannið hvørji djór og plantur eru hótt í Føroyum. Vísið á hvat tit kunnu gera fyri at verja hesi djór og plantur. Breið boðskapin út. Hettar kann gerast á alnótini ella tit haldið eitt upplegg gera eina plakat ella framføra ein sjónleik um hettar.

## Tillukku!

Tú hevur nú staðið gulu smæru. Merkið kann nú seymast á tína ermu.

Næsta stig í venjingarskipanin er reyða smæra: Reyð smæra

FØROYA
**KFUK SKÓTAR**